# skal tryggja hægri støði



*Foto: Scanpix*

## Fráboðanin er fyrsta stigið

### At boða frá er kanska fyrsta stigið til at støðga einari syrgiligari lagnu

Av Barnaverndarstovuni verður sagt, at tað er ikki altíð lætt at vita við vissu, nær eitt barn er fyri misrøkt ella ikki, men sum borgarar í samfelagnum eiga vit at vakna, tá vit hava varhugan av, at eitt barn er fyri misrøkt. Vit eiga at bjóða barninum bestu kor at liva undir, og tí skulu vit boða myndugleikunum frá, so barnið kann fáa hjálp.

Lógin um barnavernd er sera greið, tá talan er um fráboðan. Øll hava vit skyldu til at boða myndugleikunum frá, um vit kenna til mál, har barn er fyri misrøkt. Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilur tó ímillum vanliga borgaran og tann sum í starvi sínum hevur við børn at gera. Sostatt kunnu vanlig fólk boða frá ónavngivin, meðan starvsfólk, skulu vera navngivin, og fráboðanarskyldan kemur fram um tagnarskylduna.

### Fráboðanir skula vendast til barnaverndina í tínum øki

**Sosiala deild Tórshavn**
Barnaverndartænastan tlf. 30 20 60
Vakttelefonin eftir arbeiðstíð 21 60 12

**Sosiala deild Klaksvík**
Barnaverndartænastan tlf. 41 00 00.
Vakttelefonin eftir arbeiðstíð 21 91 81,

**Sosiala deild Runavík**
Barnaverndartænastan tlf. 41 70 00

**Sosiala deild Fuglafjørður.**
Barnaverndartænastan tlf. 44 50 06 ella 21 08 06.
Vakttelefonin eftir arbeiðstíð tlf. 21 50 06

**Sosiala deild Sunda Kommuna.**
Barnaverndartænastan tlf. 47 10 22 .
Vakttelefonin tlf. 77 10 22

**Barnaverndartænastan Sandavágur.**
Barnaverndartænastan tlf. 33 39 60.
Vakttelefonin tlf. 21 29 60

**Sandoyar Barnaverndartænasta.**
Tlf. 361024/281024

**Sosiala Deild Tvøroyri**
Barnaverndartænastan tlf. 37 10 85.
Vakttelefonin tlf. 22 39 96

### Fráboðanarskyldan

§ 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

Stk. 2. Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meiðslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðanin kann vera ónavngivin.

Stk. 3. Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna álvarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálar-trupulleikar.

Stk. 4. Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.

■ Harðlig atferð móti øðrum børnum
■ Talumál barnsins – málburður – tað, ið barnið fortelur um gerandisdag sín
■ Sjálvoyðandi atburður

VANRØKT/UMSORGANARSVIK
■ Matpakkin manglar ofta ella er vánaligur
■ Vánalig ella ógvuliga skitin klæði,sum eru óhóskandi til veðrið og árstíðina
■ Vánaligt reinføri
■ Vánaligar og óstøðugar avhendingar og heintingarumstøður
■ Vantandi grundleggjandi vitan kann vera tekin um vánaliga stimbran
■ Atburður, ið víkir frá
■ Harðlig atferð móti øðrum børnum

KYNSLIGUR ÁGANGUR
■ Ampi ella bløðingar kring kynsgøgnini ella gatið
■ Barnið gremur seg um pínu, tá tað er á vesi
■ Lágt sjálvsálit,torir ikki,vil ikki,heldur ikki at tað dugur nakað
■ Mistrúgv á onnur børn,vaksin og tilveruna sum heild
■ Sjálvoyðandi atferð
■ Psykosomatiskar klagur (høvuðpína,búkilska)
■ Hvíldarloysi
■ Harðlig atferð móti øðrum børnum
■ Eyðsýndan seksuella atburð

Minnist til, at í flestu familjum eru tíðarskeið, har eitt ella fleiri av omanfyri nevndu eyðkennum koma fyri. Eitt nú, tá foreldrini eru undir stórum arbeiðstrýsti, ella familjan annars er í kreppu.

Men hevur tú illgruna, set teg í samband við familjuna og met síðani um tørvur er á at fáa barnaverndartænastuna upp í málið. Um tú hevur grundaðan illgruna um lógarbrot, so set teg beinleiðis í samband við barnaverndartænastuna ella løgregluna.

Kelda: www.bvs.fo